# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Símun vann bátin



*Símun Thorkilshøj (v.m.), sum vann bátin, og Øssur av Steinum frá Kiwanis*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VINNINGUR**
*Elsa Maria Højgaard Hansen*
*Mariann Mikkjalsdóttir*
*Katrina Eyðunsdóttir Hansen*

Tað var havnarmaðurin Símun Thorkildshøj, ið vann bátin. 61 ára gamli Símun gjørdist ógvuliga ovfarin, tá ið hann hugdi í Sosialin eitt kvøldið. Har fekk hann staðfest, at hann hevði vunnið bátin í stóra lutakastinum hjá Kiwanis. Á Ólavsøku keypti hann lutaseðilin frá beiggja sínum, og drigið varð fyri umleið einum mánað síðani. Símun starvast dagliga sum maskinmeistari umborð á Teistanum. Hann er føddur í Nólsoy og uppvaksin á Borðuni, men hann býr í Tórshavn í dag. Vit spurdu Símun, hvat hann ætlaði at nýta bátin hjá sær til. Góður í huga svaraði hann, at fyrst skuldi segl keypast, tí hann hevur ætlanir um at fara hugnatúrar um summarið.

Øssur av Steinum, ið er 64 ára gamal og býr í Kollafirði, er formaður í Kiwanis Føroyar. Kiwanis er ein altjóða hjálparfelagsskapur, sum hjálpir børunm og ungum. Tey seinastu tíggju árini hava tey burturlutað ein bát á hvørjum ári. Millum annað fær Kiwanis inntøku av at selja lutaseðlar, og sum flest øll vita, selja tey eisini granntrø til jóla. Øssur greiddi okkum frá, at tey í Kiwanis plaga at fáa ókendar bátasmiðir at byggja bát á hvørjum árið.

Í ár var tað Joan Petur Clementsen á Sandi, ið smíðaði bátin. Smiðirnir fáa eina hóskandi upphædd og eitt gott umdømi, so ikki fáa teir onki.

Báturin er eitt stórt og snotuligt 4-mannafar. Hann er 21 fót langur, 3 alin og 1 tumma breiður.

Tað eru ikki einans føroyingar, ið keypa lutaseðlarnar hjá Kiwanis. Men eisini eru tað norðmenn, íslendingar og annars útlendingar, ið eru ógvuliga bergtiknir av teimum føroysku bátunum sum Kiwanis lutar út á hvørjum árið.

Fyri 35 árum síðan:

## Flogvanlukkan í 1970

Tað setti rættuligan kvøkk í alt føroya fólk, tá tað frættist, at rutuflogfarið hjá SAS-Icelandair var dottið niður í Mykinesi 26. september 1970. Flogfarið hevði rent á Knúk, ið er 560 metrar høgur.

Beint áðrenn tað skuldi lenda, misti flogvøllurin í Vágum og Mjørkadalur alt samband við flogfarið. Stutt eftir middag boðaði Mykines frá, at flogfarið var dottið onkustaðni á oynni, trý fólk vóru komin oman í bygdina at leita eftir hjálp.

Við flogfarinum vóru 30 ferðafólk og manningin sum taldi 4, av teimum kravdi flogvanlukkan 8 mannalív, teirra millum ein av manningini.



*Flogfarið fór í trý, tá tað bar við ein stein eftir at hava skreitt einar hálvtannað hundrað metrar*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1970*

†

## Andlát og jarðarferðir

Simona Nysted, Vágur, andaðist á Ellisheiminum á Tvøroyri sunnudagin, 85 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Tvøroyri Sjúkrahúsi týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Simonu, kunu lata Føroya Sklerosufelag eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Sverre Vilhelm**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Hans Eiler Hammer, prest, fyri góð og troystarrík orð, bæði í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar. Eisini ein tøkk til tykkum, sum hjálptu so væl til við ervinum.
Tøkk til Heimarøktina og til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Asta,**
**Atli, Jensa og Esta**





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo